# Christian Høgni søkti VB

**Innan tríggjar dagar hittust VB og NSÍ tvær reisur, og báðu ferðirnar syrgdu álopshetjan á landsliðnum fyri, at vágbingar máttu taka til takkar við tapi**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Í roynd og veru høvdu teir báðir seinastu dystirnir í bólki trý einki upp á seg. Bæði VB og NSÍ høvdu longu tryggjað sær víðari atgongd til fjórðingsfinalurnar. Hinvegin skuldu dystirnir gera av, hvat av liðunum var tað besta í bólkinum, og hetta viðførdi sjálvandi, at áhugin fyri dystunum báðum ikki var heilt eingin.

### 2-1 í Runavík

Skírishósdag hittust liðini bæði í Runavík. Hetta var einasta staðið, at VB tapti á útivølli í fjør, og tað skuldi eisini vísa seg, at teir taptu hesa ferð. Endaliga úrslitið varð 2-1 til NSÍ eftir at teir høvdu verið á odda 1-0 í hálvleikinum. Sum ikki eina ferð var tað Christian Høgni, sum gjørdi um seg í NSÍ álopinum, har hann stóð fyri báðum málunum hjá heimaliðnum.

Fyri VB skeyt Olivur Abrahamsen einsamalla málið, men hetta varð so ikki nóg mikið til at tryggja nakað stig í hesum dystinum.

### Aftur Christian Høgni

Tveir dagar seinni hittust liðini bæði so í Vági, og aftur hesa ferð varð Christian Høgni Jacobsen høvuðsmaðurin á vøllinum.

Hann endurtók nevnliga setningin frá leygardagin við einum máli hvøju megin steðgin, og so kundi tað gera tað sama, at VB aftur hesa ferð fekk eitt mál Hesum stóð Palli Augustinussen fyri í seinna hálvleiki.

Runavíkingar hava annars í ár ætlanir um at gera seg galdandi heilt har uppi, sum heiðursmerkini verða býtt, og við úrslitunum í steypakappingini tykist hetta ikki at vera heilt ógjørligt. Við Jens Martini í málinum hava teir fingið helst stinnasta málverjan í heimligu kappingini, og heldur Christian Høgni fram, so sum hann hevur gjørt higartil í ár, er ilt at síggja fleiri verjur í landinum, sum kunnu halda honum burtur frá málinum í samfullar 90 minuttir.



*Christian Høgni Jacobsen var fram um liðfelagarnar maðurin, sum tvær ferðir innan tríggjar dagar søkti føroyameistararnar úr Vági*

FS Vágar–VB 0–2 (0–2)

# Einki nýtt ævintýr

**Vágbingar syrgdu við fjórða sigrinum á rað fyri, at teir við 100% vissu komu í fjórðingsfinalna**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Fyri heimaliðið mundi tað vera seinasta útkall, tá VB kom á vitjan skírishósdag. Eitt stig var helst minsta krav, um felagsliðið skuldi gera sær nakrar vónir um at endurtaka steypaævintýrið, sum í fjør var eittans mál frá at bera teir til sjálvan finaludystin.

### Kanska ein fyrimunur

Hesa ferð syrgdu vágbingar tó fyri, at hetta ævintýrið verður av ongum í ár, tí longu í hálvleikinum høvdu teir sløkt alla vón um stig til heimaliðið við teimum málum, sum Tórður Holm og Palli Augustinussen skutu.

Fleiri mál komu ikki í dystinum, og sostatt fekk VB fjórða sigurin á rað í bólkaspælinum. Hinvegin mistu vágamenn at kalla alla vón um víðari luttøku, men hinvegin nýtist hetta als ikki at gerast nakar vansi fyri felagsliðið.

Í fjør tóktist tað nevnliga soleiðis, at meðan teir hjá FSV vóru sera uppsettir í steypakappingini, vildi mest sum einki rigga í landskappingini. Møguliga var hetta ein avleiðing av, at ov nógv orka varð nýtt í steypadystunum, og í so máta kunnu vágamenn síggja stórt upp á skjóta farvæl sítt í ársins útgávu av kappingini um Løgmanssteypið.

NSÍ-EB/Streymur 2-0 (1-0)

# Nýggja liðið roynist hampuligt

**Hóast teir ikki hava fingið stig móti NSÍ ella VB, so tykjast teir í EB/Streymi at hava fingið hampulig úrslit í steypakappingini**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Tað varð ongan tíð roknað við, at nýggja liðið í fyrstu deild skuldi fara at gera nakað serligt við tvey av oddaliðunum frá í fjør, VB og NSÍ. Undan skírishósdegi høvdu tey í samansetta liðnum tapt tvær ferðir fyri VB, og hesa ferð varð so talan um næsta tapið fyri runavíkingum.

Hóast fýra tap á rað, so má tó sigast, at teir higartil hava gjørt teimum til skammar, sum roknaðu við at EB/Streymur fór at fáa bank í øllum dystunum móti sterku liðunum í deildini.

Gaman í er kappingin ikki meira enn ásett, men kunnu teir longu nú vera við til at mynda partar av dystum sínum, man tað kortini ikki fara at standa heilt illa til hjá teimum.

Annars taldist Christian Høgni Jacobsen aftur hesa ferð millum málskjúttarnar hjá NSÍ, og umframt hann fekk Sonni L. Petersen eisini eitt mál fyri runavíkingar.

# Vágamenn niðastir

**Eftir at tveir dystir móti nýggja liðnum í fyrstu deild bert góvu eitt stig, er greitt, at FS Vágar endar niðast í bólki trý**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Nýggja liðið í fyrstu deild, EB/Streymur, sleppur ikki víðari úr bólkaspælinum í steypakappingini, men hinvegin er lítið at ivast í, at vónin um at lívbjarga sær man vera vaksin nakað eftir teir báðar dystirnar móti FS Vágum.

### Fýra stig

Tað eydnaðist nevnliga norðara felagsliðnum at fáa fýra stig burtur úr teimum báðum seinastu dystunum, og saman við hinum úrslitunum í kappingini, man hetta hava viðført, at sjálvsálitið er økt nakað undan landskappingini.

Fyrri dysturin millum liðini bæði varð leiktur leygardagin, og hendan eydnaðist Jón Sigurd Gleðisheygg at avgera við einum máli í seinna hálvleiki.

Mánadagin tørnaðu tey so aftur saman í Miðvági, og tað var eisini líkt til, at tað skuldi eydnast gestunum at fara av stað við øllum aftur hesa ferð. Í hálvleikinum vóru teir nevnliga á odda við einum máli, sum rumenski Sorin Anghel skeyt.

Tað eydndaist tó vágamonnum at javna við einum máli frá John Johannesen, men úrslitið bendir á, at tað aftur í ár verður sera trupult hjá vágamonnum at toga seg upp um niðurflytingarstrikuna, sum alt árið í fjør var ein stór hóttan fyri liðið.



# Reiðskapsfimleikur

**FM kapping í reiðskapsfimleiki varð hildin á Kambsdali undanfarna vikuskifti**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Legardagin 7. apríl var FM-kapping fyri lið í reiðskapsfimleiki á Kambsdali, sum fimleikafelagið Flog úr Fuglafirði var vertur fyri. Hetta er fyrstu ferð at FFS hevur biðið eitt fimleikafelag vera vertur fyri eini fimleikakapping, og mugu vit staðfesta at hetta gekk av tí allar besta, og at hesin leistur tí verður valdur í framtíðini.

**Úrslitini leygardagin vóru hesi:**

Gentur Bólkur 3 (14-15 ár)
Nr. 1 Støkk við 59,55 stigum
Nr. 2 Ljósið við 58,55 stigum

Gentur Bólkur 4 (16 ár og eldri)
Nr. 1 Støkk við 68,6 stigum
Nr. 2 Ljósið við 64,25 stigum

Dreingir Bólkur 4 (16 ár og eldri)
Nr. 1 HF við 74,1 stigum
Nr. 2 Støkk við 69,23

**Úrslitini sunnudagin vóru hesi:**

Gentur bólkur 1 (11 ár og yngri)
Nr. 1 Ljósið 1 við 277,47 stigum
Nr. 2 Ljósið 2 við 266,74 stigum
Nr. 3 HF við 263,69 stigum

Gentur Bólkur 2 (12-13 ár)
Nr. 1 Støkk við 297,24 stigum
Nr. 2 HF 1 við 283,78 stigum
Nr. 3 Fok/Flog við 273,24 stigum

Dreingir bólkur 1 (11 ár og yngri)
Nr. 1 Støkk
Nr. 2 HF

Dreingir bólkur 2 (12-13)
Nr. 1 HF við 292,74 stigum
Nr. 2 Støkk við 285,21 stigum

Samstundis var hetta ein kapping har 6 tey bestu í hvørjum bólki verða úttikin til at luttaka í FM-einstaklinga kappingini, sum verður 28. og 29. apríl í Runavík, har Støkk verður vertur.

**Tey sun hava kvalifiserað seg eru:**

Bólkur 1 gentur:
Rannvá L. Olsen, Fok
Vár Honnudóttir, Ljósið
Kira Danielsen, Ljósið
Elinborg Durhuus, Ljósið
Brim Hoydal, Ljósið
Annika Dimon, HF

Bólkur 2, gentur:
Henny Joensen, Støkk
Rósa Heinesen, Støkk
Monika Poulsen, Støkk
Sonja Joensen, Støkk
Joan Sørensen, HF
Bjørg Ellendersen, HF

Bólkur 3, Gentur:
Mia K. Mortensen, Ljósið
Unn Kragesteen, Ljósið
Elsa Helmsdal, Ljosið
Elisabeth Jacobsen, Støkk
Vanja Højgaard, Støkk
Ann Mari R. Johannesen, Støkk

Bólkur 4, gentur:
Marit Magnussen, Støkk
Anita Knudsen, Støkk
Durtia Knudsen, Støkk
Susan P. Olsen, Ljósið
Marjun Persson, HF
Marina Moraitis, HF

Bólkur 1, dreingir:
Árni Frederiksberg, Støkk
Jákup Debus Hansen, Støkk
Viljormur Davidsen, Støkk
Karl Løkin, Støkk
Búi Persson, HF
Bárður Johannesen, HF

Bólkur 2, dreingir:
Jonleif Højgaard, Støkk
Bogi Johannesen, Støkk
JákupDam, HF
Rósing Dam, HF
Øssur D.Eiriksfoss, HF
Steingrím Eikholm Joensen, HF

Bólkur 3, dreingir:
Petur Joensen, Støkk
William H. Jacobsen, HF
Knút Jarnskor, HF
Tórarin H. Petersen, HF
Magni Jacobsen, Støkk
Pól Esper Hansen, Støkk

Bólkur 4, dreingir:
Høgni R. Øster, HF
Eyvind A. Hansen, HF
Høgni H. Andersen, HF

# FM-kappingar

**ÍSB skipaði um vikuskiftið fyri FM kappingum í boccia og eisini var svimjing á skránni um páskirnar**

ÍSB
*tíðindaskriv*

Leygardagin, 7. apríl, skipaði ÍSB fyri stórari FM-kapping. Kappast varð bæði í boccia og í svimjing.

Bocciakappingin byrjaði leygarmorgunin í høllini á Hálsi, og fólk úr øllum landinum høvdu leitað sær til høvuðsstaðin henda dagin. 50 luttakarar vóru í kappingini og kappast varð í tveimum bólkum. Rørslu- og menningartarnað dystaðust sostatt hvør sær.

Úrslitið av kappingini hjá rørslutarnaðum varð hetta:
1. Jógvan Telling, Tórshavn
2. Jóanes Ziska, Tórshavn
3. Sámal Jacobsen, Tórshavn

Úrslitið av kappingini hjá menningartarnaðum varð hetta:
1. Unn Mortensen, Tórshavn
2. Jørgen av Vollanum, Miðvágur
3. Theodor Esmar Hansen, Kollafjørður

Seinnapartin var svimjikapping í Eysturskúlanum. Eftir kappingina vórðu Halla Poulsen úr Fuglafirði og Símun Petur Zachariasen úr Klaksvík kosin ársins svimjarar 2001. Eydis á Løgmansbø fekk heiðursmerki, tí hon hevði gjørt størst framstig hetta árið.



*Boccia fyrui menningartarnaå. Theodor Esmar Hansen, Unn Mortensen og Jørgen av Vollanum*

# Misjavnt hjá Rógva

**Rógvi Johansen hevur við misjavnari úrtøku koyrt tvær kappingar seinastu vikuna**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*

Kappingarárið hjá Rógva Johansen er av álvara farið í gongd, og eftir góðu byrjan hansara fyri tveimum vikum síðani, skuldi hann seinasta vikuskifti koyra í Thy.

Veðrið í hesi kapping var tó avbera vánaligt, og hetta viðførdi eisini fyri Rógva, at umstøðurnar at súkkla vóru sera vánaligar. Tá hann so eisini varð raktur av eini punktering, eftir at hann annars var komin við í eitt útbrot, misti hann sambandið við fremru súkklararnar, og mátti taka til takkar við at sita í miðbólkinum restina av kappingini.

Á mál kom Rógvi tó ongan tíð, tí vánaliga veðrðið hevði við sær, at hann snøgt sagt varð noyddur at gevast stutt áðrenn kappingin varð liðug.

### Fekk ferð á

Um páskirnar varð so aftur farið upp á hjólhestin, og í kappingini í Hobro, skuldi tað gangast øðrvísi væl hjá Rógva.

Fyrstu løtuna var tó einki serligt, og Rógvi taldist millum teir allarfyrstu, sum vórðu »settir«, men so við og við kom meira ferð á hjá vágbinginum. Eftir 130 km koyrdi hann seg upp í fremsta bólkin, og hóast tað ikki eydnaðist honum at vinna kappingina, so fekk hann nøkur stig, so talan gjørdist hóast alt um ein góðan dag, sum Rógvi sjálvur lýsir soleiðis: - Eg byrjaði við at súkkla so vánaligt, sum eg ongan tíð havi gjørt fyrr, men endaði við at súkkla so væl, sum aldrin áður.

# Summarfimleikur

**Havnar fimleikafelag fer í dag undir summarfimleikin**

*Tíðindaskriv*

Summarfimleikurin byrjar mikudagin 18.apríl. Vant verður í høllini á Stórheyggi. Kostnaður er 20 kr. fyri hvørja ferð og goldið verður við uppmøting.

Kvinnur kunnu venja tvær ferðir um vikuna mánakvøld og mikukvøld, kl. 18-19. Venjingin hjá kvinnunum eitur KOM Í FORM, sum umfatar allan vanligan fimleik, styrki, kondition og strekk.

Menninir venja eina ferð um vikuna, mikukvøld frá kl. 19-20. Venjingin hjá monnunum eitur VØDDA-TRIMMARIN har dentur verður lagdur á styrki, kondition og strekk. Tað er ikki neyðugt at hava gjørt fimleik fyrr.

# 10 gull og 4 silvur

**Føroyingarnir struku avstað við teimum flestu heiðursmerkjunum í badmintonkapping í Danmark**

BADMINTON
*Tíðindaskriv*

Dagarnir 7 og 8 apríl luttóku okkara ungu leikarir í eini badmintonkapping, nevnd »Vestfynsstævne for ungdom«, fyri leikarar frá U9 til U17.

Tað luttóku 18 av okkara ungu leikarum og ikki kann sigast annað, enn at tað var eitt ordans hál teir gjørdu.

Kappast var í ymiskum styrkisbólkum, frá A til D og fullu heiðursmerkini soleiðis:

Single U13-D gentur:
Nr.1 Jenny Nielsen (VÍF)
nr.2 Christina Eriksen (VÍF)

Double U13-D gentur:
nr.1 Jenny / Christina

Single U13-C gentur:
nr.1 Ulla í Dávastovu (VÍF)
nr.2 Rannvá á Rógvu (VÍF)

Double U13-C gentur:
nr.1 Ulla / Rannvá

Double U13-C dreingir:
nr.1 Sigurd Djurhuus Carlsen (HBF) /Jesper G. Andreassen (DK)

Single U13-B dreingir:
nr.1 Hilmar Kass Jacoben (HBF)

Double U13-B dreingir:
nr.2 Hilmar Kass Jacobsen (HBF)/Niels Poulsen (DK)

Single U13-A dreingir:
nr.1 Niclas Højgaard Eysturoy (HBF)

Double U13-A dreingir:
nr.1 Niclas Højgaard Eysturoy (HBF)/ Morten Ahrenbach (DK)
nr.2 Hilmar Kass Jacobsen (HBF)/Mark Mouritsen (DK)

Single U15-C gentir:
nr.1 Anna Katrina Arge (HBF)

Double U13-C gentir:
nr.1 Anna Katrina / ? (DK)